**Sclerosufelagið mist nógvan pening:** Dimmalætting 17/8-82

# Innsavningarkúlan í SMS stolin

## Talan um stuldur av uml. 25-30.000 kr.

**Innsavningarkúlan, sum Sclerosufelagið setti upp í SMS í vár, hvarv leygarkvøldið og er ikki afturfunnin enn. Endamálið við kúluni hevur verið, at fólk, ið vildu stuðla tí kanningararbeiði, gjørt verður at basa sclerosusjúkuni, á henda hátt kundu fáa høvi at lata pening, sum síðani skuldi setast í hjálpargrunn í Danmark. Ætlanin var at hava kúlur standandi uppi árið at enda.**




Innsavningarkúlan hjá Sclerosufelagnum

Politiið í Havn sigur, at kúlan var fest við eini ketu, sum illgerðsmenninir leygarkvøldið hava kvett av við eini tong ella onkrum tílíkum, men spurningurin er, hvussu hetta kann lata seg gera uttan at verða sæddur eitt leygarkvøld millum kl. 6.30 og kl. 7 í SMS uttanfyri kioskina Hornið, har nógv fólk kann hugsast at koma í keypsørindum.

Um stuldurin kann standa í samband við følsku fráboðanina um eldsbrunan í Hundsáarbotni um somu tíð leygarkvøldið, dugir politiið ikki at siga nakað um enn við vissu.

Óhugsandi er tað kanska ikki, at tjóvarnir í ránsørindum sínum hava gjørt hetta fyri at forða politinum í at koma nóg skjótt á staðið, um tað skuldi hent, at teir vórðu sæddir og meldaðir. Alt hetta verður nú kannað av politinum.

Av politistøðini verður sagt, at fáa teir slíkar fráboðanir um eldsbruna, trúgva teir fólki og fara avstað uttan mistanka um falska fráboðan. Fólk eru uppskakað og um ein spyr hvør, ið ringir, eru tey ofta so kvik í vendingini, at sleppa til rýmingar, at ein ikki fær orð á tey aftur. Men givið er, sigur politiið, stuldurin í SMS hevur verið tilrættislagdur framman undan.

Eisini sigur politiið, at teir hava sett seg í samband við starvsfólkið við kioskina Hornið um hetta mundið leygarkvøldið, fyri at fáa uppspurning, um tey hava verið varug við nakað óvanligt. Nøkur fólk hava verið sædd, sum politiið hevur royndt at seta seg í samband við, men er einki spurt burturúr endaliga.

### Ikki stungin í lumman

Frá Sclerosufelagnum frætta vit, at innkomni peningurin hevur verið mettur til eini 25-30.000 kr. Kúlan varð sett upp síðst í mai mánað við tí endamáli, at fólk, sum vilja stuðla hjálpararbeiðinum, sum gjørt verður í Danmark at basa sclerosusjúkuni, á henda hátt fingu høvi at lata pening, sum síðan verður settur í hjálpargrunn.

Vanligar sparibússur kunnu taka nakrar 100 og 500 kr.-seðlar og henda kúlan var stór, einar 50 cm í tvørmát og nakað væl av peningi var komið í hana. Um fleiri 100, 500 ella kanska eisini 1000 kr.-seðlar vóru komnir í, er ilt at meta um, tá alt liggur sløtt um hvørt annað, og sostatt eisini trupult at gera nakra neyva meting um, hvussu nógvur peningur var komin í.

50 cm í tvørmát sigur okkum so mikið, at henda kúlan er slíkur lutur, sum hvørki verður stungin inn undir troyggjuna ella í lumman, og at tann, sum fer avstað við honum, ikki kemur langt, uttan at verða sæddur, hvat tað er, hann ber uppi á sær, so her hevur verið borið snildisliga at, sjálvt um krókarnir í SMS eru nógvir at snúgva sær burtur í.

Hjá tjóvunum ber til at sleppa av við kúluna við at bræða hana sundur. Hon var úr plexiglasi. Um hon verður fyribeind uppá aðrar mátar, skuldi hon ikki verið ring at fingið eyga á. Á sjónum rekur hon og ikki ring at finna, um leitað verður í ruskdungum.

**Í sambandi við stuldurin í SMS:**

# Tríggir bilførarar eftirlýstir

**Síðani mánadagin hava tríggir kriminalpolitistar arbeitt við málinum um stolna sparikistilin hjá Sclerosufelagnum. Kistilin er nú funnin aftur í eini á millum Sund og Hvítanes. Hann var sjálvandi tómur, men løgreglan vil fegin koma í samband við tríggjar bilførarar, sum kunnu hava nakað við stuldurin at gera.**

Í løtuni arbeiða tríggir kriminalpolitistar við málinum um stolna sparikistilin hjá Sclerosufelagnum.

Suni Winter, kriminalpolitistur, sigur, at tað er av alstórum týdningi, at øll, sum halda seg hava sæð okkurt óvanligt í og rundan um SMS seinastu dagarnar, venda sær til løgregluna.

— Vit hava brúk fyri øllum, ið kann hugsast hava samband við stuldurin, sigur Suni Winther.

Mánadagin fór ein maður á seiðaberg millum Sund og Hvítanes, og komin oman móti fjøruni varnast hann tann stolna sparikistilin, sum lá har í tveimum. Peningurin var sjálvandi horvin, men løgreglan kannar í løtuni sparikistilin fyri m.a. fingramerki.

**TRÍGGIR BILFØRARAR**

Løgreglan hevur seinastu dagarnar avhoyrt nógv fólk og hevur eisinið verið og vitjað í grannalagnum rundan um SMS fyri at spyrja, um nakar hevur sæð eitthvørt óvanligt leygarkvøldið millum kl. 18.35 og 19.

Avhoyringarnar higartil hava givið okkurt úrslit, og løgreglan vil fegin koma í samband við tríggjar bilførarar, sum kunnu hava okkurt við stuldurin at gera.

Ein er førari av einum bláum Mazda 626, sum týskvøldið ella mikukvøldið er sæddur koma koyrandi við nógvari ferð eftir Húsagøtu og oman eftir parkeringsplássinum uttan fyri SMS, har hann síðani steðgaði uttan fyri inngongdina vestanfyri. Eftir at hava staðið stillur eina løtu koyrdi bilurin avstað aftur við nógvari ferð.

Hetta gjørdi bilførarin einar tríggjar ferðir, og vitni siga, at tað sá so mikið ógvisligt út, at lívsvandi lættliga kundi staðist av hesum leiki. Annars kundi tað sæð út, sum bilførarin vandi seg til at koma skjótt til SMS og síðani rýma skundisliga aftur.

Løgreglan sigur, at í Føroyum eru bert um 11 bilar av hesum slagnum, sum nú er eftirlýst.

Næsti bilurin, sum er eftirlýstur, er ein brúnur Morris Mini. Hann varð millum kl. 18 og 19 leygarkvøldið sæddur koma koyrandi frá vestaru inngongdini í SMS niðan eftir parkeringsplássinum út í Húsagøtu og so oman eftir Tinghúsvegnum. Bilurin hevði nógva ferð.

Triði bilurin, sum er eftirlýstur í hesum sambandi, er ein reyður bilur, sum um 21-tíðina leygarkvøldið varð sæddur koma koyrandi frá Kaldbaksbotni ella Sundi uttan at hava ljósini tendrað.

Løgreglan sigur, at tað er av stórum týdningi, at hesir bilførarar seta seg í samband við løgregluna. Hóast teir eru eftirlýstir, er ikki vist, at teir hava nakað sum helst við stuldurin at gera. Seta teir seg í samband við løgregluna, kann illgrunin móti teimum greiðast.

**MISTI LYKLAR BURTUR**

Sparikistilin var festur við tunnari ketu í SMS, og hon er klipt av við tong ella tílíkum. Sparikistilin var ikki festur á annan hátt, so ikki kann sigast annað, enn at tað ikki hevur verið serliga torført hjá illgerðarfólkinum at loysa kistilin.

Á tíðindafundi seinnapartin kom millum annað fram, at trý fólk hava verið til serligar avhoyringar hjá løgregluni. Tey eru eitt konufólk og tvey mannfólk og hava í tíðarskeiðnum, tá stuldurin hendi, upptikið vaktarmannin í SMS, tí tey søgdu seg hava mist ein lykil burtur. Lykilin var farin inn undir eina hurð í syðra enda av húsunum — longst burtur haðani, har sparikistilin stóð.

Funnið varð fram til, at lykilin veruliga var farin inn undir eina hurð, og orsøkin til tað var, at kvinnan hevði loftað við lyklunum og síðani hevði mist teir inn undir hurðina.

Tá vaktarmaðurin hevði fingið fatur á lyklunum og kom aftur á staðið, har sparikistilin hevði staðið, var kistilin horvin.

Løgreglan leggur tó dent á, at hesi fólkini eru avhoyrd, og higartil bendir einki á, at tey hava nakað við stuldurin at gera.




**Sparikistilin varð afturfunnin á staðnum, sum pílurin vísir. Løgreglan eftirlýsir nú m.a. føraranum á einum reyðum bili, sum leygarkvøldið um níggjutíðina kom koyrandi úr Kaldbaksbotni ella av Sundi uttan at hava ljósini tendrað.**

**Mett verður, at millum 30.000 og 40.000 krónur vóru í sparikistlinum. Løgreglan sigur seg tó ikki vita við vissu, hvussu nógvur peningur var í.**